## … um trúgv

- Fólk halda kanska ikki, at eg eri tann mest trúgvandi persónurin, men eg havi samband uppeftir. Eg takki altíð Gudi fyri tað, sum eg fái. Eg gangi ikki so nógv til møtir og í kirkju, men eg havi eitt persónligt samband við Gud



## … um at vera tvíburði

Tvíburðasystur mín, Hjørdis, og eg hava eitt sera tætt samband. Vit fylgdust allan vegin upp, inntil vit vórðu lidnar á fiskivinnuskúlanum. Tá fóru vit hvør sína leið hvat viðvíkur yrki. Hon arbeiðir á Aluplast, og hon er givin at sparka. Hon situr tó í nevndini í GÍ. Vit búgva eisini báðar í Gøtu, so vit eru enn tættar. Vit tosa saman hvønn dag

# at liva



*– Tey manglaðu eina kvinnu á listanum, og tey spurdu meg. Eg játtaði, men eg gjørdist sera kløkk um at koma inn í bygdaráðið. Tá hugsaði eg við mær sjálvari: »Hvat havi eg rótað meg inn í«, sigur Poula Gregersen úr Gøtu, sum einans var 22 ára gomul, tá ið hon varð vald inn í bygdaráðið við flest atkvøðum*
*Mynd: Høgni Thomsen*

játtaði, men eg gjørdist sera kløkk um at koma inn í bygdaráðið. Tá hugsaði eg við mær sjálvari: »Hvat havi eg rótað meg inn í«, sigur Poula, sum einans var 22 ára gomul, tá ið hon varð vald inn í bygdaráðið við flest atkvøðum.

– Tað er spennandi at sita í bygdaráðnum. Tað var nógv at seta seg inn í, men mær dámar sera væl, sigur hon.

### Løgtingsval ikki aktuelt

Poula er varaborgarstjóri og formaður í Trivnaðarnevndini. Umframt hetta er hon við í skúlastýrinum og bókasavnsnevndini.

Poula hevur ikki hugsað um at stilla upp til Løgtingsval. Hon er heldur ikki vís í, at hon fer at stilla upp aftur til kommunuval.

– Eg havi ikki hugsað um at fara uppí landspolitikk. Eg veit heldur ikki, um eg stilli upp aftur til kommunuval. Hetta hevur verið eitt spennandi skeið við kommunusamanlegging og nógvum øðrum á skránni. Tað er spennandi at vera við til at leggja út í kortið, hvussu Gøtu Kommunu skal mennast, men tað er ikki vist, at eg taki enn eitt tørn, sigur Poula.

### Skift arbeiði

Poula er júst byrjað í starvi hjá Eik. Hon arbeiðir sum kundaráðgevi í deildini í Fuglafirði. Hon hevur annars arbeitt tey seinastu árini á Fiskavirkinum í Gøtu.

– Eg havi arbeitt í trý og eitt hálvt ár á Fiskavirkinum sum framleiðsluleiðari. Eg havi gingið á fiskivinnuskúla, og eg hugsaði um at fara víðari í skúla. So fekk eg bjóðað starv hjá Eik, har ið eg havi møguleika at ganga í skúla, samstundis sum eg arbeiði, sigur Poula, sum kom beint í eldin við partabrævasølum, tá ið hon byrjaði fyri einum góðum mánaði síðani.

### Munur á arbeiðsplássum

Tað er stórur munur á arbeiðsplássunum, men hinar tríggjar á deildini hava tikið sera væl ímóti Poulu og gjørt sítt fyri, at hon skal kenna seg væl.

– Mær dámar sera væl her. Tað er sjálvandi altíð nógv at læra, tá ið eg byrji uppá nakað so øðrvísi í mun til alt annað, sum eg havi roynt. Tað var løgið at fara frá Fiskavirkinum, sum er ein familjufyritøka. Mær dámdi væl at hava nógv fólk rundanum meg. Tað vóru nógv ymisk fólk, og øll trivust. Eg sakni tær eldru damurnar, sum hava arbeitt har í nógv ár og so tey ungu, sum taka sær eitt fríár, áðrenn tey fara víðari í skúla, sigur Poula og heldur fram:

– Nú arbeiði eg hjá Eik, og eg fari at taka bankaútbúgvingina gjøgnum fjarlestur. Eg vil ikki útihýsa, at eg einaferð fari at lesa í Danmark, men beint nú hugsi eg ikki so langt fram, sigur hon.

### Tíð til at liva

Umframt starvið, bygdaráðið og fótbóltin, hevur Poula eisini tíð til at hava frítíðarítriv.

– Eg eigi ross. Mær dámar sera væl at kobla av við at fara ein ríðitúr, sigur hon.

Ein skuldi trúð, at Poula skjótt fær stress, men hon trívist væl við nógvu uppgávunum.

– Eg havi nóg mikið um oyruni, men ikki ov nógv. Eg havi í øllum førum tíð til at liva, sigur Poula smílandi.

## Fakta

**Navn:** Poula Gregersen
**Fødd:** 9. februar 1982
Gongur saman við Thomas, sum spælir við GÍ
Hevur gingið á Fiskivinnuskúla
Arbeiðir hjá Eik sum kundaráðgevi
Situr í bygdaráðnum í Gøtu Kommunu